Jógvan Skorheim

virkandi borgarstjóri í Klaksvík

Hvussu er at hava summarferiujob sum borgarstjóri?
Tað er spennandi at verða borgarstjóri. Í hesum umfarinum er tað bert ein vika, men tað er spennandi at hava ábyrgd og ávirkan.

Hvussu er tað at yvritaka eitt slíkt starv bert í eina viku?
Tá ið eg royndi tað fyrstu ferð í fjør, var tað trupult, men nú kenni eg betur rútmuna, so hesaferð er tað munandi lættari.

Hvat er tað besta við at vera borgarstjóri?
Tað er at hava ávirkan og at verða við til at loysa ítøkiligar trupulleikar hjá fólki í býnum.

Hvat er tað ringasta?
Øll arbeiði hava nakað gott og nakað minni gott. Tað, sum kann verða strævið, er at taka ópopulerar avgerðir, men tær mugu eisini takast.

(mynd: klaksvik.fo)

Sjúklingarnir fingu onga grind

GRIND Landssjúkrahúsið fekk bjóðað burtur av grindini í Havn seinasta leygardag, men segði nei takk

Randi Jacobsen

Grindin, sum doyði í Havn seinasta leygardag, var bara 17 hvalir, og tað metti sýslumaðurin var ov lítið at býta til tey mongu uppskrivaðu.

Sýslumaðurin avgjørdi tí at býta grindina til stovnar í kommununi. Eftir at Bakur og Stelkur høvdu fingið hvør sínar tveir finningarhvalir, og Føroya Nátturugripasavn hevði fingið ein til granskingarendamál, vóru 98 skinn eftir at býta.

Sjey eldraheim og Hvíldarheimið fingu grind, og Landssjukrahúsið fekk eisini grind í boði.

- Vit søgdu nei tak, tí í fjør fingu vit boð frá Heilsumálaráðnum, at tað ikki var hóskandi, at sjúkrahúsini høvdu grind á matarskránni, tá ið landslæknin hevði meldað so greitt út um vandan við at eta grind, sigur Allan Skaalum, stjóri á Landssjúkrahúsinum.

Avgerðin um ikki at eta grind á Landssjúkrahúsinum stendur við, til ella um onnur boð einaferð koma.

Í fjør fekk Landssjúkrahúsið átalu fyri at hava givið sjúklingum grind. Tað var grind, sum sjúkrahúsið átti inni. Nú eigur Landssjúkrahúsið onga grind eftir og vil heldur ikki hava grind.

randi@sosialurin.fo

Í MORGIN

10/13 °C



Lot til andøvsgul av útsynningi, seinnapartin snarar hann í landsynning. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.

SUNNUDAGIN

10/13 °C



Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av norði og eitt skifti regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

MÁNADAGIN

10/13 °C



Fleyr til gul av ymsum ætttum, seinnapartin gul av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið týsdagin og mikudagin:
Týsdagin lot av ymsum ættum turt og sólglottar, men mikudagin veksur hann vindin upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur. Hitin millum 11 og 15 stig.

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið

Hitalagið kring knøttin

Nuuk	5	Tromsø	6	Moskva	16	Athen	26
Reykjavík	11	Bergen	12	Berlin	25	Beijing	30
Tórshavn	10	Oslo	22	Paris	20	New Dehli	30
Lerwick	9	Stokkhólm	20	Madrid	28	Bangkok	34
Aberdeen	12	Keypmannah.	19	Róm	26	Sydney	14
London	19	Helsinki	16	Malorca	26	New York	33

LUFTTRÝSTIÐ



Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, 991 hPa. við Føroyar grynnist. Lágtrýstið á Suðurlandinum stendur í stað og grynnist. Eitt lágrýst, 1010 hPa. við Írland fer í landnyrðing.



Komandin nátt:
Lágtrýstið við Bergen hvørvur í landnyrðing. Lágtrýstið við Írland fer í landnyrðing og verður væntandi skamt eystanfyri Føroyar sunnudagin.

HITALAG



AVFALL



VESTFALLSKYRRINDI

1. juli	Mánin longst frá jørðini
4. juli	Seinna kvarter
6. juli	Jørðin longst frá sólini
11. juli	Tendring
13. juli	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2010

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
5. juli	01:50	14:23	00:50	13:23	01:05	13:38	03:50	16:23	04:50	17:23	00:05	12:38	11:38	23:58	02:05	14:38	03:05	15:38	01:35	14:08	02:50	15:23
6. juli	02:43	15:03	01:43	14:03	01:58	14:18	04:43	17:03	05:43	18:03	00:58	13:18	-	12:18	02:58	15:18	03:58	16:18	02:28	14:48	03:43	16:03
7. juli	03:25	15:47	02:25	14:47	02:40	15:02	05:25	17:47	06:25	18:47	01:40	14:02	00:40	13:02	03:40	16:02	04:40	17:02	03:10	15:32	04:25	16:47
8. juli	04:11	16:36	03:11	15:36	03:26	15:51	06:11	18:36	07:11	19:36	02:26	14:51	01:26	13:51	04:26	16:51	05:26	17:51	03:56	16:21	05:11	17:36
9. juli	05:02	17:28	04:02	16:28	04:17	16:43	07:02	19:28	08:02	20:28	03:17	15:43	02:17	14:43	05:17	17:43	06:17	18:43	04:47	17:13	06:02	18:28